Føroya Banki broytir bygnaðin

Í tíðindaskrivi í dag hevur Føroya Banki boðað frá, at bankin hevur tillagað bygnaðin til nýggju leiðslustøðuna við einum stjóra

BYGNAÐAR-BROYTINGAR

Terji Nielsen
terji@sosialurin.fo

Bygnaðarbroyingarnar eru gjørdar, soleiðis at bygnaðurin nú kann stuðla undir framtíðarætlanirnar hjá bankanum um vøkstur.

Janus Petersen, forstjóri í Føroya Banka, kemur nú at hava fimm persónar afturat sær í ovastu leiðslu bankans, sum koma at varða av hvør sínum virkisøki.
savnsmynd

Neyðugt at broyta seg til umstøðurnar

Janus Petersen, stjóri í Føroya Banka, sigur í tíðindaskrivinum millum annað, at fíggjarheimurin broytist allatíðina, og tí er tað neyðugt at tillaga seg til broyttu umstøðurnar.

- Hetta hevur bankin nú gjørt, og vit hava stungið nýggja kós út í kortið við ætlanum fyri menning av virkisøkjum bankans, bæði núverandi og nýggjum økjum, sigur Janus Petersen.

Stjórin í Føroya Banka sigur, at viðskiftafólkini hjá bankanum skulu vera í miðdeplinum fyri virksemi hjá bankanum, og at ein nýmenning av tænastum og virkisøkjum bankans verður ein náttúrligur partur av virksemi bankans framyvir, sigur Janus Petersen.

Nýggj leiðsla

Undan stjórnarskiftinum í bankanum vóru tveir stjórar í bankanum umframt 14 deildarleiðarar, ið høvdu beinleiðis tilvísing til stjórnina. Í nýggja bygnaðinum fara tað at verða fimm deildarleiðarar umframt forstjóran í ovastu leiðsluni.

Tær fimm deildirnar, ið nú koma at hoyra beinleiðis til ovastu leiðsluna eru privat, íløgur, fyrisiting, stjórnarumsiting og so ein nýggj deild, sum hevur fingið navnið menning & samskifti. Henda deildin kemur at hava sum høvuðsendamál at fremja nýggjar verkætlanir í verki til at menna virkisøkini, og at varða av samskifti bankans. Leiðari á nýggju deildini verður Johnny í Grótinum, ið annars hevur starvast í Føroya Sparikassa, umframt at hann er formaður í Búskaparráðnum.

Vinna hoyrir eisini til ovastu leiðsluna, og hesum øki kemur Janus Petersen sjálvur at hava ovastu leiðslu av, verður sagt í tíðindaskrivinum.

ENDURLÝSING

Netfyrisitari í Fíggjarmálaráðnum



Starv sum netfyrisitari á gjaldstovuni er leyst at søkja

Nú netfyrisitarin fer í annað starv á gjaldstovuni, so er starvið sum netfyrisitari leyst at søkja.
Netumsitingin veitir tænastur til stovnar í Fíggjarmálaráðnum, t.v.s. sjálvt ráðið, Føroya Gjaldstovu, Toll- og Skattstovu Føroya og Hagstovu Føroya.

Tann, ið settur verður, skal
- hava viðkomandi útbúgving og ella drúgvar royndir á økinum
- hava góð samstarvsevni
- megna at arbeiða sjálvstøðugt
- ikki vera bangin fyri at hugsa nýggjar loysnir
- tora at taka avgerðir.

Starvið er lønt sambært sáttmála millum landstýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Umsóknir skulu vera Føroya Gjaldstovu, boks 2009, 165 Argir, í hendi í seinasta lagi mánadagin 7. november 2005

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Hilmar Augustinussen, fartlf. nr. 21 2261 sum er fúsur at svara spurningum.

Um starvið:
Tann ið settur verður skal, saman við netumsitaranum hava ábyrgdina av og umsita hesar skipanir og øki:
- postskipanini (MSExchange)
- proxi- og medi-, fílu-, MS-SNA -, navna - og WEB-ambætarum.
- brúkara- og atgongdarstýring
- brandmúri (Firewall)
- miðsavnaðum og miðfirraðum antivirus
- lan/wan við switchum
- backup
- dagføringum og viðlíkahaldi av skipanunum og forskriftum
- búsjett fyri netumsitingina
- samskifti við veitarar
- EDV – trygd sum heild

Um netfyrisitingina:
Netfyrisitingin er skipað undir gjaldstovnuni. Omanfyri netfyristingina er eitt netráð. Í netfyrisitigini arbeiða umframt leiðaran ein persónur. Harafturat er eitt stavsfólk, sum í dagligdegnum starvast í tolli og skatti, knýtt til netfyrisitingina.

Heimasíða: **www.gjaldstovan.fo**

KAUPTHING

Kaupthing stendur í vøkstri, og tí leita vit eftir dugnaligum og framsøknum starvsfólkum, sum hóska til væl skipaða starvsfólkalið okkara. Í fyrstu atløgu søknast vit eftir einum umsitingarligum leiðara og tveimum starvsfólkum til útlánsvirksemi.

UMSITINGARLIGUR LEIÐARI

Við tilvísing til stjóran hevur umsitingarligi leiðarin ábyrgdina av dagligu umsitingini í felagnum, sum mennist sera nógv. Hetta merkir, at tú fært ábyrgd av at:
* gera hálvárliga og árliga roknskapin
* røkja dagliga bókhaldið og roknskapin
* avrokna í sambandi við virðisbrævahandil
* samskifta við kundar
* stýra gjaldførinum
* vera um starvsfólkini
* umsita tað, ið fyri fellur
* hava eftirlit við innanhýsis mannagongdum.

Vit vænta, at tú:
* megnar at hava skil á mongum viðurskiftum í einum
* orkar at bera byrðuna, hóast hon stundum er tung
* torir at arbeiða sjálvstøðugt
* krevur úrslit av tær sjálvum og tínum starvsfelagum
* dugir væl at samstarva
* hevur hóskandi hægri útbúgving og arbeiðsroyndir.

Harumframt halda vit tað vera týdningarmikið, at tú dugir væl enskt í skrift og talu, at tað fellur tær lætt at seta teg inn í nýggj viðurskifti, og at tú hevur hugsjónarligar tankar um, hvussu felagið kann mennast frameftir.

Vit bjóða tær:
* oddastarv við stórum avbjóðingum á høgum yrkisligum støði
* týdandi sess í livandi fyritøku, sum alsamt mennist eftir altjóða listi
* møguleika at vera lyklapersónur í hesi menning
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

STARVSFÓLK TIL ÚTLÁNSVIRKSEMI

Vinnulánsøkið og harvið eisini vinnulánsøkið hjá Kaupthing er vaksið og ment munandi seinastu tíðina, og vit søknast tískil eftir tveimum fólkum at arbeiða við vinnulánum.

Við tilvísing til leiðaran á vinnudeildini skalt tú:
* finna fram nýggj kundaevni og samskifta við tey
* røkja verandi kundar og veita teimum ráð um fígging og onnur fíggjarlig viðurskifti
* Hjálpa verandi og komandi kundum at avgreiða lánsmál og onnur fíggjarlig mál.

Vit vænta, at tú:
* velkir álit
* megnar at skapa virðing fyri tær sjálvum og starvinum
* ert útvendur og lættur at samskifta við
* dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt
* trívst í avbjóðingum
* hevur lætt við at seta teg inn í nýggj viðurskifti
* dugir væl enskt í skrift og talu.

Tað er ein fyrimunur men eingin treyt, at tú hevur hóskandi hægri útbúgving. Hinvegin er tað ein treyt, at tú hevur arbeiðsroyndir, sum hava týdning.

Vit bjóða tær:
* avbjóðandi starv á yrkisliga høgum støði í livandi felagi, sum mennist støðugt
* góðan samstarvsanda í spennandi og mennandi umhvørvi við altjóða menningarmøguleikum
* góða løn, sum verður avtalað serstakt.

Hevur tú okkurt at spyrja um í sambandi við leysu størvini á Kaupthing, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Peter Holm, stjóra.

Umsóknir skulu áðrenn 4. november sendast til:

KAUPTHING

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag p/f
Tinghúsvegur 14
Postsmoga 3090
110 Tórshavn
Telefonnummar: 351500
Heimasíða: www.kaupthing.fo